Úr grannalondum

Lagt til rættis: Árni Joensen

Bað samarnar um umbering

Finska kirkjan hevur biðið landsins samar um umbering fyri, at kirkjan í 1930-árunum loyvdi granskarum at taka beinagrindir upp úr fleiri samiskum gravum, so granskararnir kundu gera lívfrøðiligar kanningar av teimum.

Á einari ráðstevnu í býnum Ivalo um vikuskiftið gav biskupurin Bottom of Form 1

Samuel Salmi samunum eina almenna umbering fyri tað, sum hann kallaði eina illa umhugsaða avgerð. Biskupurin viðgekk eisini, at kirkjan hevur verið við til at seta tað samiska málið til viks.

Sunnudagin var tjóðardagur hjá samunum. Hann verður hildin tann 6. februar til minnis um, at tann 6. februar í 1917 hildu samarnir úr ymsum londum fyri fyrstu ferð ein sokallaðan landsfund.

Minsta arbeiðsloysið í Evropa

Tað er so nógv at gera hjá norðmonnum, at nú hevur einki land í Evropa so lítið arbeiðsloysi sum Noreg. Tølini vísa, at um mánaðarskiftið januar-februar vóru 71.000 fólk arbeiðsleys. Tað er 12 prosent færri enn fyri einum ári síðani, og norska arbeiðsloysið er sostatt 2,8 prosent.



Norska kringvarpið sigur, at tað er støðugt veksandi eftirspurningur eftir arbeiðsmegi, og í síðsta mánað vórðu 29.500 størv lýst leys.

Hanne Bjurstrøm, arbeiðsmarknaðarráðharri, sigur við NRK, at gongdin ber týðiliga boð um, at búskaparkreppan í Evropa hevur havt sera avmarkaða ávirkan á viðurskiftini í Noregi. Hon ávarar tó um, at tað er als ikki vist, at hetta verður varandi.

IMF ætlaði at lata Tjóðleikhúsið aftur

Tá íslendingar í 2009 samráddust við Altjóða Gjaldoyragrunnin, IMF, um at fáa grunnin at hjálpa landinum burtur úr fíggjarkreppuni, skutu umboðini hjá grunninum upp at lata fleiri almennar mentanarstovnar aftur, teirra millum Tjóðleikhúsið í Reykjavík.

Tjóðleikhúsið í Reykjavík

Tað kom fram, tá Katrín Jakobsdóttur, mentamálaráðharri, svaraði einum fyrispurningi í Altinginum seinasta fríggjadag.

Í svari hennara sæst, at IMF-umboðini vildu hava íslendsku stjórnina at lata Tjóðleikhúsið, Listasafn Íslands og Þjóðminjasafnið aftur í eitt trý ára skeið. Men íslendska stjórnin segði nei.

Skotar kunnu enda uttan fyri ES

Bretska stjórnin hóttir nú við at seta Skotland uttan fyri ES, um skotar velja at loysa frá hinum partinum av Bretlandi

Tað stendur skotum frítt at velja loysing frá hinum partinum av Bretlandi, men so skulu teir ikki kenna seg vísar í at varðveita støðuna sum limir í Evropasamveldinum.

Tíðindastovan Scotsman endurgevur eitt skjal hjá uttanríkisráðnum í London, har ráðið viðger tann møguleika, at Bretland kann nýta sýtingarrættin í ES ímóti einari umsókn frá einum sjálvstøðugum Skotlandi um limaskap í samveldinum.

Skotski forsætisráðharrin, Alex Salmond, er ikki samdur við bretska starvsbróðuri sínum um loysing og ES

Mynd: Polfoto

Skotski forsætisráðharrin, Alex Salmond, hevur sagt, at Skotland heldur fram sum partur av ES, eftir at landið hevur loyst frá hinum partinum av Bretlandi. Men hesum hava bretskir politikarar, teirra millum fleiri í tí konservativa stjórnarflokkinum, víst aftur. David Cameron, forsætisráðharri og formaður í konservativa flokkinum, hevur heldur ongantíð dult fyri, at hann er ímóti skotskari loysing, og hann hevur beinleiðis mælt skotum frá at atkvøða fyri loysing, tá fólkaatkvøða verður um spurningin.

Talsmaðurin hjá Alex Salmond sigur hinvegin, at Skotland er partur av ES-økinum, borgarar landsins eru ES-borgarar, og at tað er einki, sum bendir á, at hesi viðurskifti verða broytt, um Skotland verður sjálvstøðugt land.

Grønland fyrireikar seg til eina fjølbroytta alinvinnu

Sum er er fiskaaling bara nevnd í teirri grønlendsku landbúnaðarlógini, men nú skal leggja lunnar undir eina veruliga alivinnu

Í Nuuk eru embætisfólk í fiski- og landbúnaðarmálaráðnum farin undir at orða nýggjar lógir, sum skulu rudda slóð fyri vinnuligari aling á sjógvi og á landi. Lóggávan fer millum annað at umfata fiskaaling, kræklingaaling og framleiðslu úr tara.

Ane Hansen, landsstýriskvinna í fiskivinnumálum, segði í Landstinginum í síðstu viku, at landsstýrið heldur stórar møguleikar vera í einari komandi alivinnu, men at lóggávan fer at umfata nógv annað enn vanliga fiskaaling.

Lógaruppskotini, sum ætlandi verða løgd fyri Landstingið í heyst, skulu eisini umfata matvørutrygdina í sambandi við aling.

Sambært grønlendska landsstýrinum eru stórir framtíðarmøguleikar í aling bæði á sjógvi og landi

Mynd: Polfoto